# Eitt veðrakrov til Helga Abrahamsen um hann prógvar síni orð

Høgni Hoydal



Skrivari sambandsfloksins, Helgi Abrahamsen, er ein dámligur maður. Vit starvast dagliga saman á Gamla Apoteki - hurð um hurð - og hava mong góð prát, hóast sera ósamdir um mong viðurskifti.

Tí harmar tað meg almikið, at nú Helgi er kroystur í síni sera asosialu grundgeving fyri blokkstuðlinum, førir fram ósannindi. Tá grundgevingarnar eru uppi, kanst tú jú altíð leggja eftir manninum við ósannindum. Tað líkist ikki Helga at gera slíkt.

Helgi roynir í grein í bløðunum at endurtaka tey so ofta søgdu ósannindi, at undirritaði og Tjóðveldisflokkurin hava sagt, at niðurskurðurin av blokkstuðlinum fekk ongar avleiðingar. - Hvør skal siga, nú merkja tey eldru avleiðingarnar.

## Ikki pella, Helgi

Hetta er beinleiðis ósatt. Undirritaði og Tjóðveldisflokkurin hava altíð sagt, at vit skulu fíggja vælferðina sjálvi í Føroyum, og at vit við at raðfesta rætt, skulu tryggja, at tey veikastu ikki vera fyri vanbýti, tá vit gera okkum leys av teimum donsku pengunum. Vit hava støðugt ført fram, at blokkstuðulin altíð hevur verið nýttur til at geva studning, skattalættar og fyrimunir til tey ríkastu.

Eg kann vísa Helga á stevnumiðini hjá Tjóðveldisflokkinum, á allar valskráir og greinar hjá Tjóðveldisflokkinum seinastu 7 árini. Og eg kann vísa honum til bók mína "Frælsi er ábyrgd" frá ár 2000, har hetta sama er sagt og grundgivið aftur og aftur. (Eisini kann Helgi lesa øll míni svar og innlegg um Hvítubók og fullveldisætlanina).

Eg ska hervið lova Helga eitt turt veðrakrov, um hann kann ávísa bara eitt dømi um, at eg skal hava sagt nakað annað enn, at fullveldi og ongin blokkstuðul krevur greiðar raðfestingar og samhaldsfastan politikk. Og at vit ikki mugu gjara út við skattalættum og studningi, sum gjørt verður nú. Helgi kann eisini fegin vísa mær á, nær ein andstøðuflokkur nakrantíð fyrr er gingin ímóti skatta- og avgjaldslættum og hevur lagt uppskot fram um at hækka avgjøld, eins og Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt seinasta árið.

## Hvør raðfestir hvat?

Og vit hava prógvað í verki, at tað ber væl til at betra umstøðurnar hjá eldri og óhjálpnum. At styrkja Sjúkrahúsverkið. At raðfesta útbúgving, gransking, mentan og umhvørvi. At niðurgjalda skuld og at gera skilagóðar íløgur - við okkara egnu fígging og við minkandi blokkstuðli.

Fari at spyrja Helga:
- Nær varð landssjúkrahúsið útbygt? Fyri ella eftir vit minkaðu blokkstuðulin?
- Nær vóru dagtilhald og matútbering til pensjónistar sett á stovn? Fyri ella eftir vit minkaðu blokkstuðulin?
- Nær vóru pensiónirnar hækkaðar? Fyri ella eftir vit minkaðu blokkstuðulin?
- Nær var stórur vøkstur til heimarøkt og serforsorg? Fyri ella eftir vit minkaðu blokkstuðulin?

Og hinvegin:
- Nær varð farið undir at geva studning aftur til vinnulívið? Var tað meðan Tjóðveldisflokkurin sat í samgongu?
- Nær varð farið undir at geva teimum ríkastu skattalættar? Var tað meðan Tjóðveldisflokkurin sat í samgongu?
- Nær varð farið undir at skerja gransking, mentan, útbúgving og umhvørvi? Var tað meðan Tjóðveldisflokkurin sat í samgongu?
- Nær varð farið undir at skerja tey veikastu - feløgini hjá brekaðum, dagtilhald, døgurðaútbering og tílíkt? Var tað meðan Tjóðveldisflokkurin sat í samgongu?
- Nær varð farið undir at steðga skúlabygging og at søpla 10-tals milliónir burtur? Var tað meðan Tjóðveldisflokkurin sat í samgongu?
- Nær varð farið at lækka gjøld á luxusvørum og at eggja til størri innflutning, meðan útflutningsvinnan er í trupulleikum? Var tað meðan Tjóðveldisflokkurin sat í samgongu?

## Sambandsflokkurin við skerdan lut

At enda skal eg enn einaferð harmast um, at Helgi Abrahamsen er farin uppí eitt kór, sum í seinasta enda fer at gera av við sambandsflokkin. Søgan og nútíðin vísir okkum, at tað sum altíð hevur rent hetta landið á heysin og hevur slept teimum veikastu upp á fjall, er ódamliga gerðabýtið millum fólkaflokkin og javnaðarflokkin. Fólkaflokkurin sleppur at gjara út við skattapengum til vinnulívið og sínar áhugabólkar. Afturfyri skal javnaðarflokkurin sleppa at brúka danskar pengar til okkurt á sosiala økinum.

Eitt samfelag kann aldri gerast burðardygt á henda hátt. Tað áttu eftirhondini øll at kunnað ásannað. Og nú blokkstuðulin er minkaður, vita fólkaflokkurin og javnaðarflokkurin sær ongi onnur ráð, enn at fíggja sítt ódámliga gerðabýti við stórum undirskotum á fíggjarlógini. - Og sambandsflokkurin spælir við, og situr enntá við fíggjarmálum.

## Fara at selja fyri løtuvinning

Eg tori at vedda um, at í heyst - og helst longu í ólavsøkurøðini hjá løgmanni - fara fólkaflokkurin og javnaðarflokkurin at fráboða tað nýggja gerðabýtið: Fólkaflokkurin skal sleppa at privatisera tær almennu fyritøkurnar uttan nakað mál ella mið og í stórum skundi. Afturfyri skulu pengarnir fara beint í landskassan, so tað kann fíggja undirskotið og javnaðarflokkurin kann sleppa undan at skerja alt ov nógv á sosiala økinum.

Tá vit vit øll, hvat liggur í kortunum. Privatiseringar geva bert pengar einaferð, um pengarnir fara til rakstur í landskassanum. Tá eru vit við rúkandi ferð aftur í ábyrgdarloysið og 80'ini, har onki grundarlag er fyri búskapinum, og har bert verður hugt eitt ár fram í tíðina.

Tá fær sambandsflokkurin so kanska sín vilja, at føroyskir politikarar aftur mugu til Keypmannahavnar at biðja um hjálp til at verða settir undir umsiting. Tað fer at kosta dýrt hjá teimum eldru og óhjálpnu og teimum, ið ikki eru so heppin at hava fleiri almennar lønir sum eg.

Lat okkum steðga hesum í felag, Helgi. Heldur enn at føra ósannindi fram, sum onki skapa uttan máttloysi og vantandi virðing hvør fyri øðrum.

# Vegaføring gjøgnum Leirvík - fyrimunir og vansar

Jógvan Páll Sevdal,
Leirvík

**Nú upplatingin av Norðoyatunlinum av álvara er farin at nærkast, er enn ikki greitt, hvussu vegføringin leirvíksmegin skal vera. Fleiri møguleikar eru nevndir - nakrir skilabetri enn aðrir. Tað er væl skiljandi, at norðoyingar ikki hava svøvnleysar nætur av, hvussu vegurin fer at liggja í Leirvík, men vit leirvíkingar vilja hava eina haldgóða loysn, tí vit skulu liva við hesum vegnum í fleiri áratíggjur fram í tíðina. Nevnast skulu nakrir møguleikar, sum eru aktuellir.**

## 1. 80 kilometur-vegur omanfyri bygdina - niðanfyri Brekkuna

Landsverk upplýsir, at vegtekniskt og koyriteknist er hetta ein góð loysn við einum sløttum og góðum vegi. Hann kann gerast í eini handavending og kann vera liðugur á sumri 2006, tá tunnilin eftir ætlan skal lata upp. Harumframt er hetta tann bíligasta loysnin hjá landinum at fremja.

Vansarnir eru tó fleiri, sum vit í bygdini ikki eru glað fyri. Fyri tað fyrsta fara vit at missa umleið 130 grundstykkir, har komandi ættarlið skal seta búgv. Harafturat verður bygdin býtt í tvey, soleiðis at nýggir býlingar niðanfyri og omanfyri vegin verða avskorðnir hvør frá øðrum av einum landsvegi.

## Løtuvinningur.

Vit kunnu spyrja, hvør vil byggja hús tætt uppat einum sera hart trafikeraðum vegi, har lastbilar og trailarar fara at koyr dag og nátt? Hvussu við tryggleikanum hja tí komandi ættarliði - børnunum?

Flest allir leirvíkingar eru ímóti hesi vegagerð. Hetta er ein bíligari, men samstundis ein stuttskygd og lættfingin loysn, ið fer at vísa seg sum løtuvinningur.

## 2. 80 kilometur-vegføringin uppi á Brekkum

Hendan loysnin er ikki eins sannlík og tann fyrsta, ið nevnd varð. Hesin vegurin fer eisini at býta bygdina í tvey, tá bygt verður niðanfyri og omanfyri vegin vegin í framtíðini.

Trupulleikin við hesum vegnum er, at tað gerst ein lang mótbrekka frá tí lægsta punktinum inni í tunlinum og niðan á brekkuna. Hetta verður ein marra fyri lastbilførarar, sum fáa eitt nýtt Gøtueiði at baksast við. Verður vesturætt, og hann skýtur seg oman av fjalli standa eingir kalesjubilar og trailarar á hjólunum.

## Ferðsluárin.

Oljunýtslan hjá serliga tí tungu ferðsluni fer at økjast, og tann tilsvarandi dálkingin økist. Brekkurnar gerast vandamiklar í hálku, og larmurin frá ferðsluni fer at nerva íbúgvar, ið búgva nærhendis.

## Samanumtikið um 1 og 2

Samanumtikið kann sigast um hesar báðar fyrstu loysnirnar, at tær fara at skerja møguleikarnar hjá ungfólki at seta búgv í Leirvík og fara harvið at hava eina negativa ávirkan á vakstrargrundarlagið hjá bygdini sum heild. Møguleikarnir hjá kommununi at økja um skattagrundarlagið verða eisini skerdir munandi.

## Grundstykkja møguleikar.

Bygdin fer at veksa niðaneftir, og bíðilisti er til grundstykkir í bygdini. Um ein av hesum loysnum gerst veruleiki, verða ungar familjur noyddar at byggja hús við ein hart trafikeraðan landsveg. Nógvar familjur setast í døgum aftur og vilja ikki byggja í Leirvík júst av hesi orsøk. Aðrar familjur eru í bíðistøðu og vilja síggja, hvussu leikur ferst í hesum málinum. Alt til stóran bága fyri vakstrarmøguleikarnar hjá bygdini.

## 3. Sænkaður tunnil gjøgnum bygdina

Hesin møguleikin hevur eisini verið umrøddur, og við hesi loysn gerst farleiðin gjøgnum bygdina styts. Minst viðlíkahald, minst larmur og minst vandi. Í sambandi við tryggleika er hetta eisini besta loysnin. Harumframt verða núverandi havnaøkið og havnaøkið á Kráartanga bundin saman.

Einasti tvørleiki við hesi loysn er, at dagliga arbeiðið á havnalagnum møguliga verður órógvað, meðan tunnilin stendur í gerð.

## Vegurin frá tunnilsmunnanum.

Frá undirsjóvartunnilsmunnanum Leirvíksmegin eigur vegurin at liggja framvið sjóvarmálanum, sum hann nú er lagdur, tó uppnevileraður. Eigur at fara útav bakkanum umleið úti í Bólagerði, og haðani heim á Kráartanga, sum vegurin liggur nú. Úrslitið er, at eingin larmur fer at órógva eggjahúsini og tey úti á Sýnini.

Eri sannførdur um, at útinnanin av fjørðutunlaverkætlanini fer at taka størst atlit til verandi fjørðu, neyst og øðrum bygningum, sum møguliga mugu víkja fyri nevnda tunli.

Verður havnin tømd, kunnu allar ábøtur verða gjørdar og kanska samstundis dýpt.

## 4. Fíggjarviðurskifti.

Mett verður, at vegasambandið omanfyri bygdina er tann bíligasta loysnin. Í fyrstu atløgu kann tað tykjast sum ein skynsom loysn, sum tekur hædd fyri núverandi fíggjarstøðu landsins, meðan fjørðuloysnin er meira kostnaðarmikil, men besta loysnin í longdini. Um hugt verður fram í tíðina og hugsað verður um allar teir fyrimunirnar, ið fjørðuloysnin hevur, verður hetta tann mest skilagóða íløgan, ið fer at gagna bygdini sum heild langt fram í tíðina.

Tann bíliga loysnin - við øllum sínum vansum - er bert løtuvinningur.

## 5. Niðurstøða.

Í loysnini við fjørðutunlinum verður vegurin millum rundkoyringarnar hvørjumegin bygdina umleið 700 metrar. Vegurin niðanfyri brekkuna verður umleið 1800 metrar, og vegurin omanfyri brekkuna verður góðar 2 kilometrar. Upplýst er, at eingin til- og frákoyring verður millum rundkoyringarnar. Ei heldur kann nakar landsvegur bindast í bygdavegin uttan loyvi frá Leirvíkar bygdaráð.

Landsverk hevur nógv at siga í hesum máli. Stovnurin hevur nevndarlim í Noroyðatunlinum og samstundis skal stovnurin bæði geva Leirvíkar Kommunu og landsstýrismanninum tilmæli um, hvat er skila-